Aksel V. Johannesen **Nr. 69/2019**
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir tingskipanini § 52 a

Fyrispurningur viðvíkjandi veðhaldi í landbúnaðinum, settur landsstýrismanninum í vinnu- og umhvørvismálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52 a).

1. Ætlar landsstýrismaðurin at gera broytingar viðvíkjandi veðseting í landbúnaðinum?
2. Um so er, nær kunnu vit vænta, at hesar broytingar koma í gildi?

Viðmerkingar:
Áðrenn 2004 var tað soleiðis, at ætlaði ein festibóndi at gera íløgur í festið, bar til at taka eitt festilán, og garður, rakstrargøgn o.a. varð sett í veð fyri lánið. Í 2004 bleiv mjólkakvotan umsetilig, og tá kravdi Búnaðargrunnurin veð í mjólkakvotuni, skuldi eitt lán takast. Fleiri bøndur vóru tá ónøgdir, tí kvotan var privat ogn, meðan festið var ogn landsins.

Í 2007 var talan um at broyta lógina um landsjørð. Ætlanir vóru um at einskilja innangarðsjørðina og fjósini. Tá varð sagt, at verður talan um privata ogn, má veðsetingin eisini vera persónlig. Men tað vísti seg at enda við, at bara skuldin varð einskild, og ongar broytingar vórðu gjørdar viðvíkjandi ognarviðurskiftunum av innangarðsjørðini. Hetta merkir, at tá ein festibóndi í dag ger íløgur í festið, so veðsetir festarin persónligt, hóast hann einki eigur.

Løgtingsins umboðsmaður viðgjørdi eitt mál av hesum slag í 2007 og metti tá, at kravið frá Búnaðargrunninum um persónliga veðseting er ein órímilig treyt at seta festarum. Løgtingsins umboðsmaður vísti á, at tann hátturin, sum grunnurin velur at tryggja sínar ognir uppá, stendur ikki í mát við tær avleiðingar, sum kunnu verða fyri festaran.[1]

Tað er umráðandi, at hesi viðurskifti fáast í rætt lag sum skjótast, bæði so at verandi festarar fáa hug at gera íløgur í festið, og soleiðis at tað verður hugaligari hjá nýggjum festarum at taka við. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 20. apríl 2020

Aksel V. Johannesen

[1] http://www.lum.fo/Default.aspx?ID=9746&M=News&PID=31386&NewsID=2692